# Tobbi nøgdur við fylgjurnar av greinini hjá sær

**– Ætlanin við greinini fyri trimum vikum síðani var bara at fáa vinnupolitikkin hjá samgonguni inn á grynri vatn aftur, og tað hevur eydnast, heldur Tórbjørn Jacobsen**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*


*– Signalini vóru, at nú skuldi Fiskavirking bara seljast sum skjótast, og tað mátti eg steðga, sigur Tórbjørn Jacobsen*

Tórbjørn Jacobsen heldur, at hann hevur nátt tí málinum, sum hann setti sær við nógv umrøddu greinini, sum var prentað í bløðunum fyri trimum vikum síðani.

– Eg kendi meg noyddan at steðga ætlanini hjá Bjarna Djurholm um at privatisera Føroya Fiskavirking í skundi. Eg haldi, at tað málið er komið upp á pláss politiskt, tí nú hevur Bjarni Djurholm sagt, at ætlanin er at privatisera Fiskavirking í einum umvegis partabræva-marknaðin, sigur Tórbjørn Jacobsen, tingmaður fyri Tjóðveldisflokkin.

## Harðligt stríð

Hann sigur, at hevur stríðst harðliga fyri vinnupolitikkinum, sum er niðurfeldur í samgonguskjalið.

– Samgongusamráðingarnar slitnaðu meira ella minni av ósemjuni um vinnupolitikkin. Vit vildu á ongan hátt góðtaka upprunaligu ætlanina hjá Fólkaflokkinum um at privatisera Fiskavirkin í smáum pettum sum skjótast, og einu náttina endaði tað við, at partarnir fóru hvør til sítt í øðini.

– Tá Høgni Hoydal og Jørgen Niclasen seinni hesa náttina settust aftur at tosa um málið, bar tað til at fáa eina semju, og tað er hon, sum er skrivað í samgonguskjalið, og tað er hon, sum skal haldast í verki eisini, sigur Tórbjørn Jacobsen.

## Tað hevur hjálpt

Hann heldur, at eftir samgongusamráðingarnar komu signal um, at Fólkaflokkurin ikki ætlaði sær at halda seg til samgonguskjalið, tá tað snúði seg um privatiseringar av ongunum hjá Framtaksgrunninum.

– Signalini vóru, at nú skuldi Fiskavirking bara seljast sum skjótast, og tað mátti eg steðga. Tí skrivaði eg nógv umrøddu greinina um vinnupolitikkin, og eftir eitt øðiligt stríð haldi eg, at tað hevur eydnast mær at fingið málið aftur á rætta kós politiskt.

– Vit ætla at halda rimmarfast um, at Fiskarvirking skal privatiserast varliga um ein partabrævamarknað, sigur Tórbjørn Jacobsen.

# Anfinn vil einki siga

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*

Anfinn Kallsberg hevur enn ongar viðmerkingar gjørt til skrivið, sum hann fekk frá Tjóðveldisflokkinum mánadagin, og í gjár tvíhelt hann um, at hann hevur einki at siga í løtuni.

Hann vildi ikki siga, um hann góðtekur svarið frá Tjóðveldisflokkinum og harvið heldur fram sum leiðari fyri landsstýrissamgonguni.

– Nú fáa vit at síggja, hvat hendir. Eg havi so onga viðmerking í dag, segði løgmaður fyri middag í gjár.

Um tríggjar dagar skal Anfinn Kallsberg halda árligu løgmansrøðuna, sum verður roknað sum eitt týðandi politiskt manifest hjá samgonguni, nú nýtt tingár byrjar.

Løgmansrøðuna skal hann halda eftir rumbul í samgonguni, og uttan at hann hevur sagt, at hann nú kennir seg vísan í, at samgonguni er lív lagað.

# Tað fullkomna summarið hjá Brandi

**Nýggj stakfløga við Brandi Enni er komin í sølubúðirnar. Á fløguni eru tveir nýggir poppsangir, sum eru framleiddir í upptøkuhølum í Danmark**

POPPUR
*Eyðun Klakstein*

Nú liggja tveir spildurnýggir sangir klárir til fjepparar hjá Brandi Enni, tí í gjár kom nýggja stakfløgan Perfect Summer í sølubúðirnar.

Talan er um eina fløgu við tveimum poppsangum, sum eru tiknir upp í upptøkuhølum í Danmark.

Heitislagið hava Niclas Johannesen og Lena Anderssen skrivað. Niclas og Óli Poulsen hava staðið fyri framleiðsluni av lagnum, sum er ein lættur summarsangir.

Hin sangurin á fløguni er framleiddur í MediaMusic, har Eyfinn Jensen, Leivur Thomsen og Dan Faurholdt hava staðið fyri innspælingunum. Hesin sangurin kallast Dance (The Funky Cha Cha).

Brandur Enni hevur havt úr at gera í hesum árinum. Í vár kom føroyska fløgan hjá honum, Waiting in the Moonlight, og síðani hevur Brandur havt konsertir bæði heima og í útlandinum.

Brandur hevur havt útseldar konsertir í Havn, og hann spældi í juni fyri túsundtals fólki í íslendska høvuðsstaðnum. Hann vitjaði eisini hjá Bubber í donskum sjónvarpi fyri tveimum mánaðum síðani.

Fyrr í hesum mánaðinum var Brandur í upptøkuhølunum í Danmark, har hann sang nýggju sangirnar inn. Aftan á ólavsøku verður farið í holt við upptøkurnar til tríggjar sangir afturat, og tá eru allir sangirnir lidnir til útgávuna, sum skal brúkast í útlandinum.

Brandur Enni skal hava tvær konsertir á ólavsøku. Tær verða báðar ólavsøkuaftan. tann fyrra er klokkan 20.00 og tann seinna kl. 22.00.

*Brandur Enni er nú til reiðar við tveimum nýggjum sangum á fløgu*





Magni Laksáfoss:

# Føroya land skal rekast sum ein fyritøka

**Búskaparfrøðingurin, Magni Laksáfoss, metir at Búskaparráðið hevur start seg blindan í nýggjastu frágreiðingini um føroyska vinnupolitikkin**

POLITIKKUR
*Páll Holm Johannesen*

Ein av okkara fremstu búskaparfrøðingum, Magni Laksáfoss, er ikki samdur í atfinningunum hjá Búskaparáðnum um, at Vinnumálaráðið ikki skal reka føroyska samfelagið sum eina fyritøku.

- Eftir mínum tykki skal føroyska samfelagið rekast sum ein fyritøka, tí okkara vinnubygnaður er so sjáldsamur, at neyðugt er at hugsa um samfelagið Føroyar eftir einum vinnubúskaparligum leisti, sigur Magni Laksáfoss við Sosialin

Magni vísir á, at føroyska vinnulívið arbeiðir ikki undir somu korum sum vinnulív í øðrum londum, og tí er neyðugt, at samlaða føroyska samfelagið verður nýtt eftir sama mátistokki sum fyri eina fyritøku.

- So leingi vit hava so høgan orkuprís, kemur vinnulívið í Føroyum aldrin at hava somu kor sum okkara grannalond í Íslandi og Noregi, greiðir Magni frá.

Umframt orkuprísin, so nýta føroyingar væl størri útreiðslur til fiskivinnuna, enn íslendingar gera. Magni Laksafoss sigur, at føroyingar hava væl longri fjarleiðir eftir fiski, enn eitt nú íslendarar hava, og hevur hetta eyka útreiðslur við sær.

## Ósamdur við niðurstøðuni

Spurdur um hvat hann helt um sjálva niðurstøðuna hjá Búskaparráðnum, var Magni ikki heilt samdur.

- Tað tykist mær, sum teir hava stært seg blindar uppá tær fríðu marknaðarkreftirnar, tí uttan at siga tað beinleiðis, virkar tað sum, at Búskaparráðið ynskir onga almenna uppíblanding.

Sjálvandi skulu marknaðarkreftirnar ikki stýra føroyska vinnupolitikkinum, tí ein vinnupolitikk mugu vit hava, sigur Magni við Sosialin

Magni leggur dent á, málsetningurin í einum vinnupolitikki má vera, at føroysk virkir hava besta kappingarførið, og vinnupolitikkurin kemur privata vinnulívinum at gagni, so at borgarin í Føroyum fær sum mest burturúr.

Tiltøkini frá almennari síðu kunnu vera, at taka burtur forðingar, sum t.d høgir orkuprísir eru, og at privata vinnulívið fært best møguligar karmar at arbeiða undir.

Sum eitt dømi, dregur Magni Laksáfoss Føroya Tele fram, sum fyri nøkrum árum síðani gjørdist eitt alment partafelag. Bygnaðarbroytingin førdi við sær, at teleprísirnir fóru niður, og kappingarførið hjá føroysku fyritøkunum batnaði munandi.

- Eg meti eisini, at Búskaparráðið er farið eftir einum teoretiskum tangenti, og hetta skal meinast við, at teirra niðurstøður eru mær nakað fráleikakendar. Í vinnulívspartinum verður ikki komið við nøkrum vinnupolitiskum tilmælið, men heldur verður størri dentur lagdur á at finnast at Vinnumálaráðnum, sigur Magni Laksafoss um niðurstøðuna hjá Búskaparráðnum.

Annars letur Magni væl at fyrsta partinum av frágreiðingini, sum hann sjálvur sigur verða góðan og sakligan.

## Satsið uppá hjávinnurnar

Til kjakið um hvørjar vinnur føroyingar eiga at satsa uppá, so føroyska samfelagið fær fleiri bein at standa á, er Magni eirindaleysur:

- Vit hava tað svart uppá hvítt, at lond um eitt Ísland og Italia, ið bæði hava satsað nógv uppá hjávinnurnar, standa seg rættiliga væl í dag, og tí er hetta eisini ein gongd leið hjá føroyingum

Magni vísir á, at í Føroyum hava vit ikki somu møguleikar sum onnur lond, og tí skal ein satsing til á ávísum økjum. Í Føroyum hava vit eina rúgvu av hjávinnum afturat fiskivinnuni, ið undir røttum umstøðum kunnu menna seg til at vera eitt týdningarmikið ískoyti til høvuðsvinnu okkara, fiskivinnuna.

- Eg eri ikki samdur í leistinum hjá Búskaparráðnum, tí um neyðugt er, skulu vit hava almenna uppíblanding, sum tryggjar hjávinnunum góðar umstøður. Her hugsi eg ikki um studning, men heldur gransking og góðar møguleikar fyri útbúgving, sigur Magni Laksafoss.

Hjávinnurnar, sum Magni hugsar um, eru eitt nú skipasmiðjurnar, trolvinnan, lemmavinnan os.fr.

- Mín áskoðan er greið, vit skulu satsa fult og heilt uppá hjávinnurnar hjá fiskivinnuni, tí har hava vit bestu møguleikarnir at menna okkum, og føroyska samfelagið hevði notið væl av einari sundurbýttari fiskivinnu, har hjávinnurnar kundi stabilisera tí óstøðugu fiskivinnuna nakað, greiðir Magni Laksafoss at enda frá.



*Magni Laksáfoss metir at Búskaparráðið skuldi komið við einum vinnupolitiskum tilmæli, heldur enn at leggja so nógva orku í at finnast at Búskaparráðnum*

*Mynd: Savnsmynd*

# Samfeløg kappast eisini

**Bæði í Danmark og Kanada eru góð dømi um innanhýsis kapping millum samfeløg, greiðir Kjartan Kristiansen frá**

POLITIKKUR
*Páll Holm Johannesen*


*Leiðarin á Menningarstovuni er ikki samdur í atfinningunum, ið reistar eru ímóti Vinnumálaráðnum, tí umframt fyritøkur kappast samfeløg eisini*

*Mynd: Savnsmynd*

Til atfinningarnar, sum Búskaparráðið reisir ímóti Vinnumálaráðnum, er leiðarin á Menningarstovuni Kjartan Kristiansen ikki heilt samdur í. Kjartan ger Sosialinum greitt, at hansara metingar standa fyri hansara egnu rokning, og ikki Vinnumálaráðsins.

- Eg eri ikki heilt samdur við tí framseting, at tað bert eru fyritøkur, sum kappast, tí avgjørt kappast samfeløg, sum tað føroyska, við onnur samfeløg, sigur Kjartan Kristiansen við Sosialin.

Kjartan vísur á, at serliga er kapping millum samfeløg um at skapa karmar fyri einum burðardyggum vinnulívi.

## Danmark og Kanada góð dømi

- Tú sært bæði í Danmark og Kanada góð dømi um, at ovastu myndugleikarnir royna at skapa so góðar karmar sum gjørligt fyri ávísar vinnugreinir í londunum báðum, greiðir leiðarin á Menningarstovuni frá.

Kjartan leggur dent á, at í Danmark hava ymiskar vinnugreinir skattaviðurskifti, ið víkja frá teimum vanligu skattalógunum, einans tí myndugleikarnir óttast, at virkini uttan henda skattafrádrátt leita sær til onnur lond at virka sínar vørur.

Eisini í Kanada gera myndugleikarnir nógv fyri at varðveita tað útbúna fólki í Kanada. Missur Kanada hesa týdningarmiklu arbeiðsmegi til onnur lond, er stórur vandi fyri, at landið kemur at tapa í beinhørðu altjóða kappingini.

Umframt skattaviðurskiftið, so kappast samfeløg um at hava bestu vælferðarskipanina, góðar møguleikar fyri útbúgving, at skapa eitt gott granskingarumhvørvið os. fr.

- Av teirri orsøk eri eg ikki heilt samdur í tí framseting, at tað bert eru fyritøkur, ið kappast innanhýsis, tí samfeløg hava sum heild rættiliga stóra ávirkan